# Barnaverndartænastan

fyri: Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur

## Leiðari til Barnaverndartænastuna

**Fyri Sørvágs-, Vága-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunu**

Lýst verður eftir leiðara til Barnaverndartænastuna. Starvið verður sett frá 01. novembur ella sum skjótast hereftir.

Barnaverndartænastan heldur til á skrivstovuni hjá Vága kommunu í Sandavági, nakað av ferðing má roknast í starvinum.

Arbeiðsøkið er Sørvágs-, Vága-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur umframt Tórshavn.

**Uppgávur og avbjóðingar:**

- leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Barnaverndartænastuni
- leiðarin hevur ábyrgdina av, at Barnaverndartænastan er ein vælvirkandi tænastudepil
- leiðarin hevur ábyrgdina av at tryggja eitt vælvirkandi tvørfakligt samstarv við tey fakfólk í økinum, ið vara av børnum og ungum
- málsviðgerð av Barnaverndarmálum
- umsiting av børnum við serligum tørvi, smb. § 5 í dagstovnalógini

**Førleikakrøv:**

- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- kunnleika til sosiala økið, kommunal viðurskifti og fyrisitingarrætt
- leiðsluroyndir ein fyrimunur
- góð samstarvsevni

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður lønt í samsvari við fakligan førleika og royndir.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Barnaverndartænastuna, Postrúm 19, 360 Sandavágur skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi 26. oktobur 2009 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jónley Poulsen, virkandi leiðara, tlf. 213960 ella Karl A. Olsen, formann í samstarvsnevndini, tlf. 770107.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum, um ikki nóg nógvar umsóknir eru til starvið.

Hammershaimbsvegur 1 • Postrúm 19 • 360 Sandavágur
Tlf. 333 960 • Fartlf. 213 960 • E-mail bvt@sandavagur.fo

---

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

# ADVOKATFULLTRÚI

**Vit søkja eftir einum advokatfulltrúa at byrja beinanvegin**

Skrivstova okkara fæst við løgfrøðiligt arbeiði á breiðum grundarlagi. Vit umboða bæði størri og smærri privatar fyritøkur, almennar stovnar og kommunur, sum vit veita løgfrøðiligar tænastur. Vit fáast eisini við rættarmál, umframt við búviðgerð av deyðs- og trotabúgvum.

Í løtuni eru vit íalt 19 starvsfólk, harav 7 advokatar. Á skrivstovuni er eitt óhátíðarligt arbeiðsumhvørvi við góðum starvstreytum.

Vit hava nú tørv á einum fulltrúa, sum skal kunna átaka sær arbeiði innan øll okkara arbeiðsøki, men í fyrstani hugsa vit serliga um millum annað at gera ymiskt fyrifallandi løgfrøðiligt kanningar- og fyrireikingararbeiði fyri aðrar advokatar á skrivstovuni, møta í fúta- og skiftirætti bæði í Havn og sýslunum og arbeiða við innheintingarmálum.

Viðkomandi, sum settur verður í starv, skal rokna við stórari arbeiðsbyrðu, har arbeiðsdagarnir onkuntíð verða langir. Vit leggja dent á, at fulltrúin er fyrikomandi bæði mótvegis sínum starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tann, sum verður settur, skal hava evnini til at avgreiða tær ymsu uppgávurnar skjótt og væl. Eftirsum at vit eisini umboða útlendskar klientar, skal viðkomandi eisini vera væl fyri í enskum.

Tann rætti umsøkjarin kann rokna við einum spennandi og avbjóðandi starvi. Fulltrúatíðin er trý ár, íroknað skeiðvirksemi í Danmark. Løn og aðrar starvstreytir verða eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til okkara og tosa við ein av advokatunum á skrivstovuni.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast okkum til postsmogu 6, FO-110 Tórshavn ella við teldupostí til jura@jura.fo og vera okkum í hendi í seinasta lagi 2. november 2009.

Frúutrøð 4
Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35
Fax: 35 33 36
www.jura.fo



---

ADVOKATSKRIVSTOVAN

## Tvingsils-søla

**Týsdagin tann 11. november 2009 kl. 11.00**, verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 173, Eiði.**

Talan er um eini eldri sethús við kjallara, miðhædd og lofti. Búøkið er 82 fermetrar. Kjallarin er óinnrættaður. Miðhædd: gangur, køkur, tvær stovur. Loft: tvey kømur úti á lofti og baðiverilsi. Húsini krevja ábøtur.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35, e-mail frp@jura.fo** (j. nr. 20090784), ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssøluuppstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
tann 12/10-2009

Frúutrøð 4 · Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36
www.jura.fo

---

# Hjálparfólk

**Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í farloyvi frá 25.11.2009 til 03.08.2010.**

Søkt verður eftir ófaklærdum hjálparfólki til fyrifallandi arbeiði, m.a. at halda starvsstovuna ruddiliga, reingerða eftir tørvi og hjálpa til við savnsrøkt. Teldunýtsla er stórur partur av arbeiðnum og er tað tí eitt krav at duga at brúka teldu, serliga tekstviðgerð.

Havlívfrøðiliga royndarstøðin fæst við at kanna botndjór í havinum um Føroyar. Vit savna tilfar, kanna, skráseta og goyma á savni.

Løn verður eftir sáttmála við Starvsmannafelagi.

Starvið er 32 tímar um vikuna, og arbeiðstíðin kann leggjast í samráð við leiðsluna.

Tey, sum vilja hava nærri upplýsingar um starvið kunnu venda sær til Jan Sørensen, leiðara. jan@havbotnur.fo

Umsóknarfreistin er 6. novembur 2009. Tey sum eru áhugað kunnu senda umsókn til:

**Havlívfrøðiligu Royndarstøðina (BIOFAR)**
**Mjólkargøta 7 · FO-180 Kaldbak · Tlf 73 60 60**

---

**Veitst tú eina góða?**

**Ring til Sosialin tlf 341800**

---



# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

---

# Jólasølan í Kvívík

**Verður í Glæmuni 28. novembur frá kl. 14 til 19.**

**Tey, ið ynskja at verða við, kunnu ringja tlf 211490 ella 212442**

**Bygdarfelagið Glæman**

---

# Sosialurin

www.sosialurin.fo